# Nú fáa Eiði og Rituvík eisini kvøldútbering

**Mánadagin fáa haldarar hjá Sosialinum og Dimmalætting í Ritu vík og á Eiði bløðini borin til dyrnar, tí Prentmiðstøðin víðar nú um útbreiðsluøkið. Út við 80% av haldarunum fáa nú bløðini til dyrnar um kvøldið**

BLAÐÚTBERING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*




*Nú fáa haldarar í Rituvík og á Eiði eisini bløðini borin til dyrnar um kvøldið. Útbreiðsluøkið hjá Prentmiðstøðini fevnir nú um út við 80% av haldarunum hjá bløðunum*

Mánadagin víðkar Prentmiðstøðin – sum stendur fyri útberingini av Sosialinum og Dimmalætting - um virksemið sítt, so haldarar í Rituvík og á Eiði eisini fáa bløðini um kvøldið.

– Vit hava alsamt víðað um útbreiðslu økið seinastu árini, tí málið er at so nógvir haldarar sum gjørligt hjá bløðunum skulu fáa blaðið um kvøldið, sigur Hallstein Sigurðsson, sum stendur fyri útberinginin av bløðunum hjá Prentmiðstøðini.

Tað Sosialurin og Dimmalætting, sum í felag eiga Prentmiðstøðina, sum prentar bæði bløðini, og tað er hetta felag, sum eisini stendur fyri úberingini og hevur gjørt tað, síðani bløðini fóru frá Postverkinum.

Vikuskiftisbløðini verða borin út um alt landið, uttan á útoyggj og á einstøkum smáplássum. Dagliga útberingin fevnir um Klaksvík í Norðoyggjum, í Eysturoy uttan norðureystur bygdirnar, í Norðstreymoy allar bygdir uttan Tjørnuvík, Haldarsvík og Saksun. Í Vága allar bygdir uttan Bø og Gásadal, í Suðurstreymoy uttan Velbastað, Kirkjubø, Kaldbaksbotn og Kaldbak. Á Sandoy og í Suðuroy verða bert vikuskiftisbløðini borin út.

Mánadagin verða Eiði og Rituvík tiknar við í útbreiðsluøki hjá Prentmiðstøðini, og fáa haldarar hjá Sosialinum og Dimmalætting tískil bløðini borin til dyrnar hvørt kvøld.

Tilsamans ber Prentmiðstøðini bløð út til út við 80% av haldarunum hjá Sosialinum og Dimmalætting.

## Einki val á Toftum

**Mótsatt fleiri av undanfarnu valunum er bara ein listi til kirkjuráðsvalið í Nes kirkjusókn**

KIRKJURÁÐSVAL
*Jan Müller*

Tað verður einki kirkjuráðsval í Nes kirkjusókn hesa ferð. Tá ið freistin at lata listar inn var farin, var bara ein listi komin valnevndini í hendi. Tað ber við sær, at tey sjey, sum standa ovast á listanum, koma í kirkjuráðið, og at tað tískil ikki verður neyðugt við vali.

Áður hevur verið friðarval, sum tað verður nevnt, í Nes kirkjusókn, men fleiri tær seinastu ferðirnar hava tað verið tveir listar. Nú eru tey, sum árini frammanundan hava staðíð á tveimum listum, stillað upp á einum lista.

Tey sjey, sum standa ovast á listanum, og sum harvið fara at manna kirkjuráðið í Nes kirkjusókn, eru Niklas Foldbo, Toftir, Hans Jákup Hansen, Nes, Niclas Davidsen, Toftir, Ólavur Magnussen, Nes, Súni í Hjøllum, Toftir, Petur Jacob Petersen, Saltnes, og Arni Højgaard, Toftir.
Talan er um sama kirkjuráð, sum hevur sitið fýra tey seinastu árini. Undantakið er, at Petur Jacob Petersen í Saltnesi verður nýggjur í kirkjuráðnum. Hann kemur inn fyri Regin Jacobsen á Nesi.

# Sosialurin broytir útgávudagin

**Frá mánadegnum komandi verður dagfestingin á Sosialinum broytt soleiðis, at fyrsta blaðið í vikuni verður eitt mánadagsblað í staðin fyri eitt týsdagsblað**

BLAÐÚTBERING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Seinastu árini er útgávutíðin hjá bløðunum støðugt flutt fram, og tá nú bróðurparturin av bløðunum verður borin út um kvøldið við útberingini hjá Prentmiðstøðini, hevur blaðleiðslan á Sosialinum gjørt av, at útgávudagurin nú skal broytast.

Føroysku bløðini eru seinnu árini broytt frá at vera fyrrapartsbløð til seinnapartsbløð. Fyri at bøta um reglusemi við útberingini, verða bløðini frá komandi viku prentað ein hálvan tíma fyrr, og merkir tað, at bløðini verða fyrr á gøtuni.

Blaðboðini hjá Prentmiðstøðini bera bløðini út seint seinnapartin og um kvøldið, meðan blaðsølurnar fáa bløðini tíðliga seinnapartin, tær fyrstu í Havn beint eftir kl 14.

Blaðið, sum verður prentað mánadagin, verður tað fyrsta blaðið, sum verður dagfest sum mánadagsblað.

Bløðini fara í framtíðini at verða dagfest sum mánadags-, týsdags-, mikudags- og hósdagsblað, meðan vikuskiftisblaðið, sum kemur út fríggjadag, framvegis fer at verða nevnt vikuskiftisblað - Vikuskifts Sosialurin.

# - Sera áhugavert at vera politistur

**Løgreglustøðin í Tórshavn hevur seinastu tvær vikurnar havt tveir praktikkantar, Ruth Thomassen og Jona Ásvør S. Samuelsen. Tær eru báðar úr Miðvágs-Sandavágs skúla og ganga í 10. fl.**

STARVSVENJING
*orð og myndir :*
*Rannveyg F. Joensen*
*og Kirstin Khaliqhey*



*Ruth og Jóna Àsvør standa erpnar í hvør sínum flotta løgreglubúna. Tær eru klárar at takað stríði upp móti brotsmonnum*

– Eg valdi at fara í praktikk á løgreglustøðini, tí eg haldi at tað er sera áhugavert og spennandi. Eg hevði gott kunnað hugsað mær at havt hetta sum mítt framtíðar yrki, sigur Ruth álvarsom. Jona Ásvør nikkar og tekur undir við henni.

Teimum dámar sera væl á politistøðini. Starvsfólkini eru fitt og blíð, og vóru sera væl fyrireikað uppá hvat praktikkantarnir skuldu gera. Ruth og Jona Ásvør høvdu fingið eitt skema frá teimum áðrenn tær byrjaðu starvsvenjingina.

– Fyrsta dagin vit komu, vóru vit móttiknar við einum smíli frá starvsfólkunum. Tey komu øll yvir at heilsa uppá okkum.

*Hvat ger man sum praktikkantur á einari løgreglustøð?*

– Vit hava gjørt so nógv ymiskt. Vit hava verið á kanningardeildini, útrykningsdeildini, og verið hjá ferðslu- parkeringspolitistunum. Eisini sluppu vit á fútaskrivstovuna, har tey skriva bøtur og tílíkt, sigur Ruth við einum lítlum brosi.

– Vit hava eisini verið á náttarvakt fríggjakvøldið, men har hendi ikki tað stóra. Vit bara steðgaðu nøkrum bilum. Hóskvøldið vóru vit við til eina hundavenjing, har tey millum annað eisini trenaðu narkohundin, sigur Jona Ásvør smílandi og hyggur uppá Ruth.

– Ja, eg var bangin fyri hundunum áðrenn vit fóru, men nú ræðist eg teir als ikki. Teir eru í veruleikanum rættuliga fittir, sigur hon og rodnar.

At enda fortelja tær okkum, at tey hava eitt fitness sentur á løgreglustøðini.

– Ja vit hava gjørt nógv búkøvilsir og lyft vektir, tí um man skal vera politistur má man styrkja vøddarnar. So tit mugu bara ansa tykkum, ella koma vit eftir tykkum, siga tær og flenna.

